


Boðað verður við hesum til ársaðalfundar í Eik Banka P/F
**leygardagin 27. mars 2010, kl. 17.00** í Norðurlandahúsinum, Tórshavn

**Dagsskrá:**

1. Frágreiðing frá nevndini um virki hjá Eik í farna ári
2. Framløga av grannskoðaðari ársfrásøgn til góðkenningar
3. Avgerð um rindan av halli sambært góðkendu ársfrásøgnini
4. Uppskot um at heimila nevndini at lata bankan ogna sær egin partabrøv í tíðini fram til næsta ársaðalfund
   "Nevndin skjýtur upp, at aðalfundurin heimilar nevndini í tíðini fram til næsta ársaðalfund at lata bankan ogna sær egin partabrøv – til ognar ella sum veð – upp til eitt samlað áljóðandi virði svarandi til samanlagt 10% av partapeningi bankans, sambært § 48 í partafelagslógini. Tá bankin ognar sær egin partabrøv til ognar, má keypsprísurin ikki víkja frá galdandi børskursi við meira enn 10%."
5. Viðtøkubroytingar
   Fyri vali standa tveir nevndarlimir. Uppskot er komið frá 3 umboðsráðslimum um at minka talið á teimum aðalfundarvaldu nevndarlimunum úr 7 í 6 soleiðis, at bert ein nevndarlimur verður valdur á ársaðalfundinum og at stytta valskeið nevndarinnar úr 4 árum í 3 ár, frá ársaðalfundinum at rokna, tó soleiðis, at nevndarlimir valdir í 2007, 2008 og 2009 sita sítt valskeið fult út.
   Skotið verður tí upp, at § 15, stk. 1 í viðtøkunum, ið er soljóðandi:
   "Í nevndini eru 7 limir valdir av aðalfundinum. Afturat hesum koma teir limir, ið lóggávan annars ásetir." verður broytt til:
   "Í nevndini er 6 limir valdir av aðalfundinum. Afturat hesum koma teir limir, ið lóggávan annars ásetir." og at § 15, stk. 2 í viðtøkunum, ið er soljóðandi:
   "Teir av aðalfundinum valdu nevndarlimirnir verða valdir fyri 4 ár í senn. Hvørt ár fara frá annaðhvørt ein ella tveir limir samsvarandi teirri raðskipan, ið aðalfundurin hevur samtykt. Limur, ið fer frá, kann veljast aftur." verður broytt til:
   "Teir av aðalfundinum valdu nevndarlimirnir verða valdir fyri 3 ár í senn. Hvørt ár fara frá annaðhvørt ein ella tveir limir samsvarandi teirri raðskipan, ið aðalfundurin hevur samtykt. Limur, ið fer frá, kann veljast aftur."
   Nevndin mælir til, at tikið verður undir við uppskotunum til viðtøkubroytingar.
6. Val av nevndarlimum
   Fyri vali standa tveir nevndarlimir. Um so er, at uppskotini undir pkt. 5 verða samtykt, skal tó bert ein nevndarlimur veljast í eitt 3 ára skeið.
7. Val av grannskoðara
8. Ymiskt

**Partapeningur og atkvøðurættur**
Partapeningur felagsins er kr. 812.927.400, lutaður sundur í 8.129.274 partabrøv.
Umboðsráðið útinnir atkvøðurættin hjá partaeigarunum á aðalfundinum.
Partaeigarar hava við at vísa atgongdarkort atgongd til aðalfundin, har teir hava talurætt, men ikki atkvøðurætt.

**Ársfrásøgn 2009 og fullfíggjað dagsskrá**
Grannskoðað ársfrásøgn 2009 og fullfíggjað dagsskrá fara at liggja frammi á høvuðsskrivstovu bankans, Yviri við Strond 2 í Tórshavn, í seinasta lagi 8 dagar áðrenn aðalfundin.

**Bílegging av atgongdarkortum**
Atgongdarkort verða útflýggjað teimum partaeigarum, sum, í seinasta lagi fríggjadagin 19. mars 2010, hava bílagt umvegis heimasíðu okkara www.eik.fo ella biðið stjórnarskrivstovuna um hetta umvegis teldupost til: office@eik.fo ella á telefon 348571 og 348565. Eftir hetta verða atgongdarkort ikki útflýggjað.

**Kontoførandi peningastovnur**
Eik Banki P/F er partabrævaútgevandi peningastovnur í sambandi við partabrøv felagsins. Partaeigarar kunnu sostatt útinna síni fíggjarligu rættindi við at venda sær til Eik Banka P/F ella egnan kontuførandi peningastovn.

Tórshavn, tann 11. mars 2010

**Eik Banki P/F**
Nevndarinnar vegna

Frithleif Olsen
nevndarformaður

www.eik.fo




TAKS



REINGERÐARFÓLK
til Fíggjarmálaráðið er leyst at søkja.
Freistin at søkja er 25. mars 2010 kl 15.00

